## Japanar fiska tunfisk

Hesa ársins tíð plaga skip úr Japan at koma í Norðuratlantshavið at royna eftir tunfiski, og soleiðis er eisini í ár. Morgunblaðið skrivar, at tá eftirlitsflogfarið hjá íslendsku vaktar- og bjargingartænastuni var á ferð gjáranáttina, sá tað tólv japonsk tunfiskiskip. Tey japonsku skipini royndu í altjóða sjógvi sunnan fyri tað íslendska markið. Tað er ikki loyvt at veiða tunfisk í íslendskum sjógvi í ár. Íslendingar hava kvotu, men fiskimálaráðið hevur goymt kvotuna og flutt hana til 2011, skrivar Morgunblaðið.



## Brenna kaninir

Á hvørjum ári verða umleið 6.000 kaninir skotnar í svenska høvuðsstaðnum Stockholm, skrivar Aftonbladet. Sambært blaðnum er í flestu førum talan um kaninir, sum fólk hava havt sum kelidýr, men sum tey av einari ella aðrari orsøk sleppa sær av við. Í fleiri ár endaðu tær deyðu kaninirnar á teimum kommunalu ruskplássunum, men eftir boðum frá ES bleiv tað steðgað í 2006. Tá kom onkur við hugskotinum at brúka kaninirnar til hita, so nú verða tær skotnu kaninirnar latnar vatnverkinum, har tær enda í ovnunum, sum hita vatnið í Stockholm, skrivar Aftonbladet.

# Svanur skipar fyri boccia-kapping

**Rørslu- og menningartarnað fara týskvøldið í mentanarvikuni at kappast í skúlanum við Løkin**

MENTAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Ikki kann sigast annað enn, at nýggja ítróttarfelagið fyri brekað í Eysturoynni, Svanur, hevur verið sera virkið, síðani tað var sett á stovn fyri lítlum hálvum ári síðani. Felagið hevur bæði skipað fyri og verið við til ítróttarkappingar, og nú heystið stundar til, verður hildið fram.

Fyrsta stóra takið var ein ítróttardagur á Eiði . Har varð skipað fyri bæði boccia- og borðtenniskappingum umframt øðrum stuttligum kappingum.

Endamálið hjá Svani er at menna ítrótt fyri rørslu- og menningartarnað í Eysturoynni og at fremja rørslu- og kappingarítrótt. Ætlanin er at skipa fyri kappingum og ítróttarstevnum í samstarvi við ÍSB, og tey vóna, at felagið kann vekja ans millum rørslu- og menningartarnað fyri týdninginum av at iðka ítrótt, bæði til likams og sálar.

Longu við stovnan hevði felagið sítt egna búmerki, og nú eisini heimasíðu, har til ber at kunna seg um felagið og tiltøk, sum verða.

Í mentanarvikuni í Runavík skipar Svanur fyri Boccia kapping í skúlanum við Løkin. Tiltakið verður týskvøldið 20. oktober kl. 19.00.





# Marjun M. Berg í Orkis

**Áseymaðar myndir og akrylmálningar verða at síggja í Orkis mentanarvikuna í Runavík**

Marjun M. Berg, sum í fleiri ár hevur fingist við at mála og seyma myndir, sýnir verk síni fram í Orkis alla menatnarvikuna.

Hon hevur verið við á framsýningum hjá Lions í Runavík og í Havn, og hon hevur áður havt framsýning bæði í Orkis og Sense í Runavík.

Marjun hevur fingið frálæru frá Sámal Toftenæs, Arcibald Black, Hilmar Højgaard og Børge Møller. Innan myndaseyming hevur hon fingið frálæru frá Evu Andersen og Solveig Refslund.

Framsýningin verður alla mentanarvikuna og hevur somu upplatingartíðir sum Orkis.

# At renna er mentan

**Mentanarvikan í Runavík verður sett við rørslu**

Sunnudagin klokkan 15 verður mentanarvikan í Runavík, beint eftir sjálva setanina, sett við heilsurenning frá býráðshúsinum.

Fyrst setir Sølvi Reinert Hansen, ítróttarforseti mentanarvikuna, og so tekur býráðslimurin Kári Jacobsen yvir og greiðir frá, hvørjar teinar fólk kunnu renna ella ganga.

4,2 km teinurin: Býráðshúsið - Ítróttarhøllin – Gerðisvegur – Leitisbrekka – Leitisvegur - Dalavegur – Heiðavegur - býráðshúsið.

2,2 km: Býráðshúsið - Ítróttarhøllin – Gerðisvegur – Heiðavegur – býráðshúsið.

Áðrenn farið verður, fer Bassi at býta endurskyn út til luttakararnar. Øll eru vælkomin at luttaka, ung sum gomul.

Hornorkestrið fer sum altíð at seta sín dám á løtuna.



*Sølvi Reinert Hansen*

## Fyrilestur um haru og haruveiðu

Í Mentanarvikuni verður fyrilestur um haru og haruveiðan í Býráðssalinum hjá Runavíkar kommunu. Tað er Dorete Block, professari í djórafrøði á Fróðskaparsetri Føroya, ið fer at halda hendan fyrilestur.

Dorete Bloch arbeiðir m.a. við gransking innan haru og haruveiðu. Økið er sera breitt, og tískil hevði tað verið til stóra hjálp, um veiðufólk hjálptu til at savna inn tilfar til Dorete. Hon fer at greiða frá, hvussu hetta tilfar kann savnast. Á hendan hátt kann mann stuðla arbeiðinum í at menna vitanina hjá teimum, sum granska á økinum.

Fyrilesturin, sum er ókeypis, verður hildin týskvøldið 20. oktober kl. 19.30.

# Mótsetningar á framsýning

**Tað gamla húsið er heitið á framsýningini, sum verður í býráðsalinum í Runavík mentanarvikuna**

Sunrid í Gong, sum er úrbúgvin fotografur, hevur framsýning í Runavíkar býráðssali mentanarvikuna.

Hon sýnir fram fotomyndir og grafisk prent, og hetta eru øðrvísi myndir.

Hetta merkir, at í staðin fyri at taka eina flotta mynd í tí vøkru náttúruni, velur Sunrid heldur at finna mótsetningar. Eitt ikki so vakurt gamalt hús kann síggja flott út í vakrari náttúru. Tá tað snýr seg um grafiska partin, brúkar Sunrid hús og bygningar. Hon fær íblástur frá bygningum úr stórbýum, eitt nú russiskum byggihátti umframt gomlum føroyskum húsum.Sunrid í Gong hevur atelier í Saltangará, har hon hevur nógvar ymiskar uppgávur, men tekur sær nógv av portret fotograferingum.

Framsýningin er opin allar dagar í mentanarvikuni frá kl 15.00 til 18.00.